Tryggingareftirlitið

Tryggingarfeløg, eftirlønargrunnar og avvarðandi grannskoðarar og tryggingarfrøðingar

**Tórshavn 22. desember 2017**
Journalnr.: 17/00414-1

**Jólabræv 2017**

Við hesum vil Tryggingareftirlitið nýta høvi at gera vart við og kunna um ávís viðurskifti, ið leiðslur í tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum, grannskoðarar og ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingar eiga at vera varug við í 2018.

## 1. Lógarbroytingar o.a.

Sum áður fráboðað, koma ætlaðu broytingarnar í løgtingslóg um tryggingarvirksemi og nýggju kunngerðirnar  ikki í gildi 1. januar 2018. Tá uppskotið um at broyta tryggingarlógina er samtykt í løgtinginum og sett í gildi, verða kunngerðirnar settar í gildi við virknaði frá 1. januar 2019.

Nýggju kunngerðirnar, sum skulu koma í gildi eru:

1) Leiðslukunngerð
2) Solvenskunngerð
3) Basiskapitalkunngerð
4) Roknskaparkunngerð

Smærri rættingar og broytingar verða gjørdar í mun til uppskotini, ið vórðu send til hoyringar. Tryggingareftirlitið fer tí at senda feløgunum uppskotini til kunngerðir av nýggjum, har framdu broytingarnar síggjast. Feløgini fáa síðani høvi at gera møguligar viðmerkingar, áðrenn kunngerðirnar verða lýstar.

## 2. Meting av individuella solvenstørvinum í 2018

Sambært galdandi solvenskunngerð (Kunngerð nr. 1 frá 15. mars 2010 um gjaldføri (solvens) og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum) er tað nevndin, sum skal góðkenna yvirskipaðu hættirnar at meta um individuella solvenstørvin og skal góðkenna uppgerðina. Feløgini hava tikið støði í royndarútrokningunum til Solvens ll (QIS). Vísandi til vegleiðing nr. 1 frá 13. apríl 2010 um at  gera upp individuellan solvenstørv, metir Tryggingareftirlitið, at tann seinasta QIS royndarútrokningin í størri mun enn áður endurspeglar einstøku váðarnar og føroysk viðurskifti.

Tann 30. juni 2017 sendi Tryggingareftirlitið nýggja solvenskunngerð til hoyringar. Við hesi kunngerð verða solvensreglurnar fyri tey føroysku tryggingarfeløgini at kalla tær somu sum tær, ið eru galdandi fyri tryggingarfeløg í ES, ið gera upp solvens eftir sonevnda standardmodellinum í Solvens II regluverkinum.

Eins og víst á í jólabrævinum 2014 metir Tryggingareftirlitið, at tað er umráðandi, at ikki ov stórur munur er á uppgerðini av individuella solvenstørvinum eftir verandi uppgerðarhátti í mun Solvens II reglurnar, sum nú innganga í standardmodellið í uppskotinum til nýggja solvenskunngerð.

## 3. Lívrenta

Sambært § 9, stk. 2, í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn (eftirlønarlógin) skal samansparda eftirlønin útgjaldast, soleiðis at:

1. Í minsta lagi 45 % skal verða útgoldið sum lívslong veiting, lívrenta, sum verður útgoldin leypandi til viðkomandi doyr.
2. Í minst lagi 55 % kann verða útgoldið sum lutaeftirløn yvir eitt avtalað tíðarskeið, í minsta lagi 10 á.r
3. Í mesta lagi 15 % kann útgjaldast sum kapitalútgjald, t.e. í einum.

Insurance Authority, Skálatrøð 20, P. O. Box 73, FO 110 Tórshavn, Tel +298 35 60 20, Fax +298 35 60 35, www.tryggingareftirlitid.fo

Sambært § 10, stk. 2 í eftirlønarlógini taka ásetingarnar í § 9, stk. 2 við, tá samlaða eftirlønarsamansparingin kemur uppá 400.000 kr.

Tá ræður um lívrentu, er tað m.a. ein spurningur, hvørja trygd eftirlønarsamansparararin hevur frá sínum eftirlønarveitara fyri lívslongu veitingini, og harvið hvønn váða eftirlønarveitarin átekur sær. Kann eftirlønarsamansparararin rokna við eini fastari ella vaksandi upphædd, so leingi hann er á livi? Kann hann rokna við, at lívslanga veitingin verður sett niður vegna gongdina á fíggjarmarknaðinum ella vegna hækkandi livialdur?

Danska Fíggjareftirlitið skipaði í vár fyri eini ráðstevnu við heitinum *Pension når garantierne forsvinder*, og sendi í hesum sambandi út eitt kjakupplegg við sama heiti. Tryggingareftirlitið vil við hesum taka upp umrøddu spurningar um lívrentu við feløgini, og heitt verður á nevndirnar í tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum um at lata Tryggingareftirlitinum eina frágreiðing, sum í høvuðsheitum lýsir ta lívrentu, nevndin ætlar at bjóða sínum eftirlønarsamanspararum sambært § 9, stk. 2, í eftirlønarlógini. Frágreiðingin skal verða latin Tryggingareftirlitinum í seinasta lagi 1. juni 2018.

**4. Lyklatøl**

Sambært § 132 í roknskaparkunngerðini skulu lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini hava eitt 5-ára yvirlit við lyklatølum samsvarandi fylgiskjali 9. Feløgini verða biðin um at lata Tryggingareftirlitinum eina útgreining av, hvussu lyklatølini í árfrásøgnini 2017 eru útroknað fyri øll 5 árini.

**5. Yvirlit yvir tíðarfreistir og tilfar at lata Tryggingareftirlitinum í 2018**

Í viðfesta fylgiskjali eru settar upp tíðarfreistir fyri, nær tilfarið skal verða latið Tryggingareftirlitinum.

----------------

Tryggingareftirlitið takkar fyri gott samstarv í brátt farna ári og ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Leivur Harryson

# Yvirlit yvir tíðarfreistir og tilfar at lata Tryggingareftirlitinum í 2018

| Tíðarfreistir: | Tilfar at lata Tryggingareftirlitinum: | Lógargrundarlag: |
|---|---|---|
| 16. januar 2018 | Upplýsing um, nær **nevndarfundur** verður hildin, har **ársfrásøgnin** fyri 2017 verður **góðkend** | Sbr. §§ 122, stk. 1 í tryggingarlógini |
| 1. februar 2018 | Fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** á TB oyðublaði (hvønn ársfjórðing) | § 5, stk. 9 í kunngerð nr. 1 frá 15. mars 2010 um gjaldføri (solvens) og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløg-um |
| 1. februar 2018 | Fráboðan um **skrásettar ognir og tryggingarligar avsetingar o.a.** á PP oyðublaði (hvønn ársfjórðing) | § 8 í kunngerð nr. 1 frá 14. oktober 2009 um skráseting av ognum hjá tryggingarfeløgum |
| 2 dagar aftaná nevndarfundin, har ársfrásøgnin er góðkend | **Ársfrásøgn, góðkend av nevndini**:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla<br>(**Útgreining av lyklatølum í 5 ára yvirlitinum** (pdf)) | § 122, stk. 1 í tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná nevndarfundin, har ársfrásøgnin er góðkend | **Grannskoðanarprotokoll** (pdf) | § 122, stk. 2 í tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná aðal-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend, tó í seinasta 1. mai 2018 | **Ársfrásøgn**, **góðkend av aðalfundinum**, undirskrivað av fundarstjóra, nevnd, stjórn og grannskoðara:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla (um broyting) | § 123, stk. 1 og 4 í tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná aðal-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend, tó í seinasta 1. mai 2018 | **Ársfrásøgn fyri dótturfeløg**, ið ikki eru tryggingarfeløg | § 123, stk.3 í tryggingarlógini |
| 1. mai 2018 | TB- fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** | - |
| 1. mai 2018 | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |
| 10 dagar aftaná aðal-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar**: frágreiðing frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi,** latin nevndini í sambandi við, at nevndin góðkendi ársfrásøgnina. | § 7, stk. 7 í kunngerð nr. 7 frá 15. desember 2008 um ábyrgdar-havandi tryggingarfrøðing. |
| 1 mánað aftaná aðal-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar: **árliga frágreiðingin frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi** at lata Tryggingareftirlitinum. | § 8, stk. 2 í kunngerð nr. 7 frá 15. desember 2008 um ábyrgdar-havandi tryggingarfrøðing. |
| 1. august 2018 | TB-fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** | - |
| 1. august 2018 | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |
| 31. august 2018 | **Hálvársfrásøgn** fyri hálvárið 1. januar - 30. juni:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla | §§ 2 og 145 í kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum |
| 1. november 2018 | TB-fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** | - |
| 1. november 2018 | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |

## Ársroknskapir og hálvársroknskapir sum excelfílur
Oyðubløð til ársroknskapir kunnu takast niður sum excel fílur av heimasíðuni: www.tryggingareftirlitid.fo

**Dagførd TB og PP oyðubløð**

Mint verður á at senda inn av nýggjum dagførd TB- og PP oyðubløð fyri 4. ársfjórðing 2017, um fráboðaðu tølini 1. februar 2018 eru broytt í mun til ársfrásøgnina 2017. Dagførd oyðubløð skulu sendast eftirlitinum í seinasta lagi samstundis sum tann grannskoðaða og góðkenda ársfrásøgnin verður latin eftirlitinum. Broytingarnar skulu vera merktar við reyðum.